## Grikkar skulu spara

Tey seinastu næstan 40 árini hevur tað almenna Grikkaland drigist við skuld, sum er vaksin á hvørjum ári, soleiðis at í dag skyldar ríkiskassin meiri enn 2.200 milliardir krínur. Tað vil siga, at hvør einasti grikki skyldar 200.000 krónur. Grikska stjórnin hevur biðið ES um hjálp, men svarið verður ætlandi nei. Tað merkir, at grikkar skulu venja seg til munandi aparingar. Eitt nú skulu teir almennu útreiðslurnar skerjast 10 prosent, ein triðingur av ferðaskrivstovunum uttanlands lata aftur, og summi skulu rinda munandi meiri skatt enn nú, skrivar AFP.



## Putin rósti Berlusconi

Russiski forsætisráðharrin, Vladimír Putin, ringdi fyrradagin til italska starvsbróður sín, Silvio Berlusconi, og rósti honum fyri at hava víst seg um ein mann, tá hann bleiv álopin í Milano sunnukvøldið. Talamðurin hjá Putin, Dmitrij Peskov, sigur við russisku fjølmiðlarnar, at russiski forsætisráðharrin hevði eisini fordømt álopið á Berlusconi. Putin og Berlusconi hava leingi verið væl og umrøða hvør annan sum vinmann, skrivar AP. Í fjør var Putin og vvitjaði Berlusconi á oynni Sardinia, og í heyst var Berlusconi og vitjaði Putin í St. Pætursborg, har russiski forsætisráðharin býr.

# 4500 føroyingar vilja sleppa heim til jóla

**Hugurin hjá føroyingum uttanlands at sleppa heim at halda jól, er størri enn nakrantíð fyrr**

JÓLAFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ringar tíðir rína ikki við útisetar, sum vilja sleppa heim til jóla.

Tað mugu bæði Atlantsflog og Smyril Line ásanna.

Bæði flutningsfeløgini kunnu nevniliga staðfesta, at hugurin hjá útisetum at sleppa heim at halda jól, hevur ongantíð verið størri enn í ár.

Av tí sama eru aftur í ár fleiri eykatúrar settir á skránna, fyri at geva øllum áhugaðum møguleika at sleppa heim.

Jákup Sverri Kass, marknaðarstjóri í Atlantsflogi, sigur, at av tí sama fara tey at flúgva tveir túrar fleiri í ár, enn tey gjørdu í fjør.

Sostatt flúgva tey 37 túrar heim til Føroyar í ár frá í dag fram til jóla afturímóti 35 túrum í fjør.

Flogið verður úr Keypmannahavn, Ålborg, Billund, Reykjavík, Oslo, London og Aberdeen.

Harumframt eru tveir leigutúrar úr Bergen og úr Haugesund í Noregi.

- Tilsamans hava 3300 fólk bílagt sær ferðaseðil heim við Atlantsflogi, sum er eitt sindur meiri enn í fjør.




*Ongantíð áður koma so nógvir føroyingar heim at halda jól, sum í ár og nú eru øgiliga fáir ferðaseðlar eftir við Norrønu og Atlantsflogi*

- Hetta er tað mesta, sum hevur verið, sigur marknaðarleiðarin hjá Atlantsflogi.

Tilsamans er pláss fyri 3400 fólkum, so tað eru 100 ferðaseðlar eftir og teir eru á túrum úr Keypmannahavn, heilt uppiundir jólum, men annars eru nakrir fáir ferðaseðlar eftir úr Haugesund, Bergen og Reykjavík.

### Mugu tillaga seg

Jákup Sverri Kass ásannar, at hetta førir eisini við sær, sær at øll sleppa ikki heim ella avstað, tá ið tey vilja.

- Men hetta eru nógv fyrireikað upp á og tí er tað longu beint eftir summarfrítíðina, at fólk bíleggja sær jólaferðina heim.

Hinvegin eru tað nógv lesandi, sum ikki fyrrenn rættiliga seint vita, nær próvtøkurnar eru lidnar, so tey fáa ikki bílagt ferðaseðil heim fyrrenn tað líður út á árið.

Hinvegin verða ferðafólk úr Danmark eisini flogin heim umvegis Noreg.

Ferðafólkið fær so smátt heimaftur eftir jól, men tann 10. januar er øll jólaferðslan avgreidd.

### Norrøna fullfermd

Annars fer Norrøna eisini at sigla ein túr heim á jólum og tað er ein túrur úr Keypmannahavn tann 19. desember.

Norrøna hevur fyrr siglt heim á jólum, men hetta er fyrstu ferð, at hon siglur úr Keypmannahavn.

Og tað hava ferðafólk tikið væl ímóti, tí fyribils eru tað 1096 ferðafólk, sum hava bílagt sær ferðaseðil og tað er tað mesta, sum hevur verið.

Men á Smyril Line vænta tey eini 50 fólk afturat og tá eru øll kømurini seld.

Sostatt verður skipið at kalla fult, tí hóast pláss er fyri yvir 1482 ferðafólkum við skipinum, hevur Smyril Line gjørt nøkur fýramannakømur um til tveymannakømur.

# Kanna føroyskar gæs og dunnur fyri krím

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan ætlar nú at kanna gæs og dunnur í Føroyum fyri at vita um tær hava krím, sum kann elva til álvarsliga sjúku hjá fólki**

KANNINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ætlanin er nú at fara undir at kanna gæs og dunnur í Føroyum fyri krím.

Tí vil Heilsufrøðiliga Starvsstovan ógvuliga fegin koma í samband við fólk, sum fara at drepa gæs og dunnur í næstum.



*Heilsufrøðiliga Starvsstovan vil hava greiði á, hvussu stórur vandi er fyri, at virus hjá dunnum og gæs kann elva til álvarsliga sjúku hjá fólki*

Tað er Susanne Kabell, djóralækni á Heilsifrøðiligu Starvsstovuni, sum stendur fyri kanningunum.

- Hetta eru kanningar, sum verða gjørdar víða hvar í øðrum londum og tað er avgjørt eisini hóskandi at gera tær her í Føroyum, sigur hon.

Hon vísir á, at seinastu tíðina hava nógvir føroyingar ligið við H1N1 krími.

- Vit vita eisini, at nógvir fitjufuglar kunnu vera vera berarar av sjúkuni, uttan sjálvir at verða sjúkir.

Serliga hugsar hon um tiltikna H5N1 virus, ið vanliga varð nevnt fuglakrím, sum varð rættiliga nógv umrøtt fyri nøkrum árum síðani og sum eisini elvdi til nakað av sjúku úti í heimi, har eisini nøkur fólk doyðu.

Men krímelvandi virus hevur tað við at blandast saman og hendir tað, at fuglakrím og krímið, sum nú gongur, blandast saman, kann tað elva til álvarsliga sjúku hjá fólki.

Tað er nógvur fitjufuglur í Føroyum, bæði villur og húsdýr.

Og Susanne Kabell heldur avgjørt, at vit eiga at kanna dunnur og gæs fyri virus fyri at fáa eitt yvirlit yvir, hvussu stórur tann vandin er, at krím av hesum slagnum kann fara at gera um seg í Føroyum.

Tí vil hon fegin, at tey, sum fara at drepa gæs ella dunnur í næstum, seta seg í sambandi við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, so at royndir kunnu takast av fuglunum.

Avtala kann so fáast við Starvsstovuna um, hvussu royndin kann takast, men í øllum førum fer hetta ikki at kosta fólki nakað, tí Starvsstovan ber allan kostnaðin.

Men tey leggja afturat, at tey vóna at fáa royndir úr øllum landinum fyri at fáa eina so góða mynd av støðuni, sum gjørligt.

- Tað, vit hava brúk fyri, er høvdið og minst 10 sentimetrar av hálsinum og royndin skal takast, áðrenn gásin ella dunnan verður skáldað.

Tey hugsa sær, at royndir verða tiknar av 5-10 fuglum úr hvørjum flokki, sum verður dripin.